STARVSLÝSING

## Goymslufólk

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi goymslufólki til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um útflýggjan av maskinlutum / amboðum, umframt viðlíkahald og stýring av goymslu og amboðsrúmi á maskinmiðstøðini.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari við kunnleika til entreprenørmaskinur og lasbilar hevur fyrimun, tó er tað eingin treyt. Harumframt krevst góður teldukunnleiki. Umsøkjarin skal hava vanligt koyrikort

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært avvarðandi yrkissáttmála ella sambært avtalu.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi seinasta lagi 16. des. 2005. Merkið brævbjálvan "Umsókn goymslufólk". Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Nielsen, goymsluleiðara, á tlf. 422 420 ella 540 958

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

# Ein fløga sum er nær við lurtaran

**Filadelfia-samkoman í Havn gevur í næstu viku út sína fyrstu lovsangsfløgu við heitinum "Nær hjá tær". – Vit ynskja at lurtarin kemur at kenna Guds kærleika, gleði og frið heilt persónliga í lívi sínum, sigur Gunvør Jacobsen, lovsangsleiðari í samkomuni**

FLØGA
*Snorri Brend*

**Filadelfia:** - Við hesi fløguni ynskja vit tí at draga menniskju nærri Gudi, sigur lovsangsleiðarin, Gunvør Jacobsen.

Hetta ber heitið á fløguni eisini boð um, og tí er endamálið at røkka út til alt Føroya fólk og har skapa ein tosta og ein longsul eftir tí livandi Gudi.

Visjónin og hjartans ynski okkara er at Filadelfia-samkoman skal verða ein lovsongs- og tilbiðjanarmiðdepil, sum røkkur út til alt Føroya fólk.

Tað er við hesum í huga at vit hava framleitt okkara fyrstu lovsongsfløgu, sum kemur út í næstu viku, verður sagt.

Sangirnir og tónleikurin á fløguni fevna breitt. Alt er tikið upp í Kris-stuff Studio í Havn, og eru tað eigarin Kristoffur Mørkøre og Bárður Háberg ið hava ljóðblandað fløguna.

### Nærvera

Fyri samkomuleiðaran í Filadelfia, Tummas Jacobsen er tað eisini ein stórhending, nú henda fløgan kemur út.

Hann hevur sjálvur verið virkin innan kristiligt sang- og tónleikaarbeiði, og hevur eisini verið við til at geva út fleiri tónleikaútgávur.

Tað eru liðin nógv ár síðani hann fyrstu ferð bæði hoyrdi og sá lovsang, og í honum hevur altíð verið eitt hjartans ynski um at samkoma hansara eisini kundi geva út eina slíka fløgu eisini.

Vit hava nú framleitt hesa fyrstu lovsangsfløgu okkara. Tað hava vit gjørt, fyri at tann Andans nærvera, sum vit kenna frá møtum okkara, eisini kann koma inn í stovurnar hjá fólki.

Eg ynski tí, at Harrin má signa tey ið lurta eftir fløguni og at hann má koma nær við Anda sínum, sigur Tummas Jacobsen um fløguna.

Nú fløgan verður útgivin fara eisini bønirnar hjá samkomuni at fylgja fløguni og øllum teimum, sum fara at ogna sær hana.



HDYGD er nýggja felagsnavnið og vørumerkið hjá Vatnsoyra Snikkaravirki og Føroya Glugga

- **HDYGD** vindeygað og hurðin verða gjørd úr tí besta tilfarinum til føroysk viðurskifti.
- **HDYGD** heldur so leingi, at vit bjóða 10 ára trygd!
- **HDYGD** vindeygu fáast sum toppsving, síðusving, síðuhongd og topphongd.
- **HDYGD** vindeygað fæst úr træi, træi/alu og plasti.

Tað var í Ålesund í 1959 at Harald Kvasnes, sum hevði arbeitt við vindeygum sum serøki, uppfann tað framúrskarandi vindeygað, har ramman kundi snarast allan vegin runt um egna ás, soleiðis at til bar at standa inni og vaska útsíðuna. Navnið gjørdist »Husmorvinduet« sum ein heiður til hennara, sum tá í tíðini stóð fyri reingerðini av húsunum.

Í meira enn 30 ár hava vit framleitt og ment hesi vindeygu. Vindeygað, sum upprunaliga æt »Husmorvinduet«, eitur nú HDYGD-vindeygað.

Vøruskrá okkara fevnir í dag um vindeygu, út- og altanhurðar, húsaklædning o.a.

VINDEYGUNI SIGA ALT

H·DYGD

HDYGD | Í GEILINI 2 | FO-385 VATNSOYRAR | FAROE ISLANDS
Tel.: +298 332177 | Fax: +298 333166 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

REPROZ